# Bjørt listarlig framtíð



– Um hetta er okkara komandi listarliga elita, so sær ógvuliga bjart út. Hetta heldur Rakel Helmsdal, annar av samskiparunum á listastevnuni fyri ung 2004. – Men skulu tey ungu halda fram at mennast innan listina, er alneyðugt, at tey verða stuðlað nú, heldur hon

UNG Í FØROYUM
*Orð: Eydna Skaale*
*Myndir: Jens Kr. Vang*
*& Hallur Helmsdal*

60 ungdómar, í aldrinum 13 til 18, vóru í vikuskiftinum savnað í Norðurlandahúsinum, har triðja listastevnan fyri ung varð hildin. Har arbeiða tey við 6 ymiskum listagreinum í smáum verksmiðjum við 10 luttakarum. At hvørji verksmiðju er knýtt eitt yrkislistafólk, sum skal vegleiða og leggja lag á. – Hetta er ikki ein listaskúli, men heldur eitt høvi at seta fokus á tey ungu, teirra áhuga og teirra list. Ein møguleiki hjá teimum at føra fram egin listarlig hugskot og at samstarva við onnur ung, sum hava sama áhuga, sigur Rakel Helmsdal.

### Tey ungu skulu sjálv

Stórur dentur verður lagdur á, at tað eru tey ungu, ið seta dagsskránna. Intiativið og hugskotini skulu koma frá teimum sjálvum. Verkstaðsleiðarin skal so, við sínum royndum og vitan, geva teimum íblástur til at broyta hugskotini til ítøkiligar verkætlanir, sum so verða framførdar síðsta dagin á stevnuni. Og sambært Rakel Helmsdal er ikki trot á hugskotum:

– Tey ungu hava eina ótrúliga stóra skapandi orku. Í hasum aldrinum verða tey ofta sett í bás, sum verandi ómøgulig og torfør at hava við at gera, men í veruleikanum tykist tað, sum um teimum bara tørvar okkurt at nýta alla sína orku til. Tey mugu fáa spennandi avbjóðingar og møguleikar. Tað er sera týdningarmikið, at vit vísa teimum, at hóast tey ikki eru vaksin og roynd listafólk, so hava tey stóran týdning, tá tað kemur til listina her í landinum. Tey mugu takast í álvara, so tey fáa hug at mennast og halda fram.

At stevnan verður hildin í Norðurlandahúsinum, at tað er mentamálaráðharrin, ið setir stevnuna og at tað eru yrkisfólk, sum arbeiða við teimum, ger, at stevnan fær ein høgan status. Tey ungu kenna seg tikin í álvara, og hetta veksur um ábyrgdarkensluna.

– Eg eri púra ovfarin av, hvussu nógv evnarík listafólk eru her. Og tey kýta seg veruliga, ynskja at gerast betur og tey hava eitt ómetaligt árræði. Tey mugu stuðlast og eggjast nú, so listin ikki dettur niðurfyri, men kann gerast ein náttúrligur partur av teirra framtíð, sigur Rakel Helmsdal.

### Tørvurin sera stórur

At tørvurin á slíkum tiltøkum er alstórur sæst á øllum brøgdum. Til hesa listastevnuna fingu tey yvir 100 umsóknir, men pláss er bara fyri 60 luttakarum, so bíðilistin er langur. Tey, ið saman við umsókníni greiddu frá onkrum, sum tey ætlaðu at framføra fyrsta kvøldið av stevnuni, vórðu tikin framum. Luksus trupulleikin hjá fyrireikarunum var bert tann, at tað vóru fleiri enn 60, ið høvdu fyrireikað eina framsýning av onkrum slag. Hetta gjørdi tað sera ringt hjá teimum at velja og vraka luttakararnar til stevnuna. Men hóast nøkur sita eftir sum við sviðið soð, og ikki sluppu við, er tó ein fyrimunur við hesi skipan:

– Tað er heilt greitt, at støðið er hækkað síðan fyrstu stevnuna. Tey ungu vita nú, at tað er avmarkað pláss og torført at koma inn. Tí royna tey veruliga at gera sítt besta fyri at fáa júst teirra íkast til framførðsluna fyrsta kvøldið at ljóða so spennandi og gott sum gjørligt. Soleiðis vóna tey at betra um møguleikan at verða útvald. Hetta ger, at støðið í ár er heilt ótrúliga høgt. Men sum støðið hækkar, gerst tað eisini truplari hjá okkum at velja. Vit royndu at vera so rættvís sum gjørligt, men tað er torført, tá plássið er so avmarkað, sigur Rakel.

Luttakararnir eru úr øllum Føroyum, tó eru flestir úr Havnini. Hetta kemst av, at tey ungu í Havn hava bestu møguleikarnar at menna seg listarliga. Bæði kvøldskúlar, musikkskúlin og dramaverkstøð runt um í Havnini, eru við til at hækka støðið. Hetta eru fyrimunir, ið als ikki mugu takast fyri givið. Onkrar umsóknir vóru beinleiðis neyðarróp frá ungum bygdafólki, sum ikki hava nakað at fara til í heimbygdini, og sum veruliga sakna mennandi samveru við onnur ung.

### Endamálið

– Okkara fyrsta og fremsta endamál er at geva teim ungu, skapandi kreftunum eitt forum, har tey kunnu møtast, mennast og hugna sær saman. Av tí, at tey eru so ung, eru tey eisini ógvuliga frítt hugsandi. Tey hava ikki fingið ein vanabundnan hugsunarhátt enn, og teirra nógvu øðrvísi hugskot skulu virðismetast og stimbrast. Vit vóna og vænta, at hetta tiltakið framhaldandi fer at hækka um listarliga støðið og ikki minst áhugan fyri listini, sigur Rakel Helmsdal.

Roynt verður at »fanga« møgulig komandi yrkislistafólk so tíðliga sum til ber, áðrenn tey veruliga leggja sær lívsætlaninar til rættis. Tá tey gerast eldri fara tey at hugsa meiri vanabundið, og velja ofta eina vanligari, praktiskari lívsleið. Tey gerast kanska bókhaldarar í staðin fyri rithøvundar.

Fyrireikararnir vænta heilt víst, at arbeiðið fer at síggjast aftur í framtíðini. Og teir vóna, at listastevnan kann vera steinurin, sum fær ringarnar at breiða seg. Bæði við at støðið alsamt fer at hækka, men eisini við at fleiri listarlig tilboð koma til tey ungu. Áhugin er jú ógvuliga stórur og ynskiligt kundi verið at fingið bøtt um karmarnar, sum listaáhugaði ungdómurin í dag arbeiðir innanfyri. Nógva staðni eru eingi tilboð til tey ungu yvirhøvur, og har tilboð eru, eru sum oftast bíðilistar. Hetta ger, at ung, evnarík listafólk ofta bara nøta listina til eitt frítíðarítriv, tá tíðin loyvir tí.

Rakel Helmsdal er tó bjartskygd:

– Um hesi ungu fólkini eru tey, ið fara at mynda listarligu framtíð Føroya, so sær tað ógvuliga ljóst út, sigur hon við einum smíli.

## Barbara Vang
**13 ár úr Havn**



– *Hvøjum verkstaði hevur tú verið á?*
– Eg havi verið á skriviverkstaðnum.

– *Hvussu hevur tær dámt stevnuna Ung 2004?*
– Mær hevur dámt sera væl. Hugnakvøldið var ordiliga gott. Tað hevur eisini verið spennandi at læra nýggj fólk at kenna.

– *Hvat hevur tú fingið burturúr?*
– Eg havi lært okkurt nýtt um skriving, tað havi eg. Og so eri komin at kenna fleiri fólk.

– *Eru tað nóg mikið av tilboðum til ung listaáhugaði?*
– Nei, tað manglar. Tað burdi verið fleiri møguleikar.

## Birita í Dali
**16 ár úr Havn**



– *Hvørjum verkstaði hevur tú verið á?*
– Eg havi verið á skriviverkstaðnum.

– *Hvussu hevur tær dámt stevnuna Ung 2004?*
– Mær hevur dámt væl. Tað hevur verið spennandi at skriva. Vit skrivaðu leikin til sjónleikaraverkstaðin, tað dámdi mær ordiliga væl.

– *Hvat hevur tú fingið burturúr?*
– Eg lærdi nógv av at skriva handan leikin. Og at arbeiða saman við fólki, sum hava aðrar meiningar. Havi fingið nógv burturúr.

– *Eru tað nóg mikið av tilboðum til ung listaáhugaði?*
– Nei, tað átti at verið meiri. Og hendan stevnan átti at vart í eina viku, ikki bert eitt vikuskifti.







Eivør Pállsdóttir, skeiðleiðari og fyrrverandi skeiðluttakari:

# Alt ov fá tilboð til ung!

**– Tey ungu, sum eg eri verkstaðsleiðari hjá, brenna veruliga fyri tónleikinum, men tey hava alt ov fáar møguleikar at mennast, sigur Eivør Pállsdóttir**

UNG Í FØROYUM
*Orð: Eydna Skaale*
*Myndir: Jens Kr. Vang*
*& Hallur Helmsdal*

– Eg haldi, at listastevnan fyri ung er eitt ógvuliga gott tiltak, men tað er allíkavæl avmarkað, hvussu nógv nýtt tey kunnu læra eftir bert hálvum øðrum degi – óansæð hvussu intenst tú arbeiðir við teimum. Meiningin við hesi stevnuni er tí meira at geva teimum ungu nýggjan íblástur, so tey kunnu koma eitt fet víðari við listini, enn at hava vanliga undirvísing, greiðir Eivør frá.

### Støðið er høgt

Tey ungu eru opin og djørv og vilja fegin royna nakað nýtt. Tey súgva til sín av góðum ráðum og samstundis eru tey sjálvi full í nýggjum hugskotum. Tey samstarva væl og eru sanniliga ikki bangin fyri at greiða hinum luttakarunum frá egnum royndum.

– Tað fyrsta vit gjørdu, var at seta okkum niður og tosa um, hvat tey vildu og væntaðu av Ung 2004. Meiningarnar vóru eitt sindur ymiskar, so tey valdu at býta seg í tveir bólkar og arbeiða við tveimum projektum.

Annar bólkurin ger rocktónleik, meðan hin arbeiðir meira við fólka-poptónleiki. Saman við Eivør løgdu tey so eina arbeiðsætlan fyri dagarnar. Har er nógv nýtt á skránni, millum annað smíða tey egin løg.

– Tey eru veruliga góðir tónleikarar og støðið er høgt, sigur Eivør.

### Eg mennist eisini

Fyrstu ferð listastevnan fyri ung var, var í 2001 og tá var Eivør sjálv ein av luttakarunum.

»Eg havi altíð elskað alt, sum hevur við list og serliga tónleik at gera. Eg helt, at listastevnan var ein góður møguleiki at læra okkurt nýtt og fáa íblástur«, sigur hon.

Tá var hon tilmeldað sjónleikaraverkstaðin, og sjálvt um sjónleikur ikki er tað hon er kend fyri, so man hon hava fingið okkurt burturúr, tá hon nú, 3 ár seinni, hevur valt at traðka til sum leiðari av einum verkstaði.

Hóast hennara leiklutur hesuferð er at syrgja fyri, at stevnuluttakararnir fáa sum mest burturúr, sigur hon seg eisini hava fingið væl burturúr tímunum í verkstaðnum sjálv.

– Eg fái eisini nógvan nýggjan íblástur av teirra nógvu hugskotum. Og at læra frá sær er sera mennandi í sær sjálvum, sigur sangfuglurin úr Gøtu.

### Vantandi tilboð

Men hvat leggur ein verkstaðsleiðari seg eftir at vísa teimum ungu, tá hetta nú ikki er vanlig undirvísing?

– Eg royni at birta teimum hugin at halda fram sjálv, eftir at stevnan er lokin. Men tað er torført hjá teimum at mennast, tí tilboðini til teirra eru alt ov fá. Tað átti at verið nógv fleiri tilboð til tey ungu. Fleiri møguleikar eru at gera hetta ynski til veruleika, eitt nú kundi skeiðundirvísing verið eitt tilboð. Tað kann væl lata seg gera. Tað ræður um at fáa tað besta fram í teimum nú, meðan tey eru ung. Undirtøkan og hugurin hjá teimum er í øllum førum til staðar, staðfestir Eivør Pállsdóttir at enda.



## Finn Haraldsen
**15 ár úr Havn**



– *Hvørjum verkstaði hevur tú verið á?*
– Sjónleikaraverkstaðnum.

– *Hvat hevur tær dámt stevnuna Ung 2004?*
– Tað hevur verið mega stuttligt. Sera læruríkt!

– *Hvat hevur tú fingið burturúr?*
– Eg havi lært nógv. Vit hava roynt alt møguligt, sum eg ikki havi roynt fyrr, t.d. fleiri mátar at upptraðka. Men vit vóru kanska eitt sindur for nógv á holdinum, í mun til talið av rollum í leikinum, sum skriviverkstaðurin skrivaði til okkum.

– *Eru tað nóg mikið av tilboðum til ung listaáhugaði?*
– Tað veit eg ikki ordiliga, tað kundi kanska verið meiri. Eg haldi í øllum førum, at listastevnan skuldi verið longri. Arbeiðstíðin er ov stutt, tá tað bara er eitt vikuskifti. Kanska kundi hon eisini verið fleiri ferðir um árið.

## Jákup Lützen
**15 ár úr Havn**



– *Hvørjum verkstaði hevur tú verið á?*
– Eg havi arbeitt við tónleiki.

– *Hvussu hevur tær dámt stevnuna Ung 2004?*
– Mær hevur dámt væl at arbeitt saman við øðrum. Og at vit hava funnið uppá alt sjálvi, uppá so stutta tíð.

– *Hvat hevur tú fingið burturúr?*
– Eg havi lært nógv, t.d. at gera løg. Havi eisini roynt okkurt, sum eg aldrin havi roynt fyrr. Eg havi upptraðkað við rocktónleiki og sungið á konsertini. Vanliga spæli eg elektriska violin.

– *Eru tað nóg mikið av tilboðum til ung listaáhugaði?*
– Nei, tað er ikki heilt nøktandi. Ella... eg veit ikki, tað eru nokk nógv tilboð, men kanska man bara skal taka seg saman og fara til tey.